**Rektarans røða til pisurnar á Kambsdali 28. juni 2024**

Skúlin er eitt byggipláss. Vanligu spælireglurnar her á staðnum broyttust nakað, tá næmingar, handverkarar og maskinur skuldu húsast undir sama taki. Tíbetur hevur tað gingið væl. Sera væl. Tit hava víst óvanliga góð evni til at tilpassa tykkum til tær umstøður, sum tit hava fingið.

Tíðin á miðnámi er fyri tey flestu endin á tannárunum. Viðhvørt verður sagt, at vit skulu bera yvir við tannáringum, tí heilin er undir umbygging. Eg rokni við, at umbyggingin av skúlans fysisku karmum er lítið aftur í móti tí umbygging, sum er farin fram í høvdi og hjarta hjá tykkum næmingum. Tit hava lært eina rúgvu bæði bókliga og menniskjaliga.

Góðu pisur

Hjartaliga tillukku við próvnum. í dag seta vit eitt punktum í tykkara lívssøgu. Eitt skeið er liðugt, og annað byrjar. Hóast tit eru sera ymisk, so hava tit havt nakað serligt í felag. Nógv av tykkum eru farin frá at vera hálvvaksin til at vera vaksin, tit hava fingið koyrikort, tit hava fingið valrætt, onkur hevur fingið maka og annað mangt er hent í tykkara lívi hesi árini.

Um eina løtu fáa tit eitt prógv við nøkrum tølum, sum siga nakað um, hvussu væl tit hava klárað tykkum í viðurskiftum, sum kunnu teljast og mátast. Tey flestu av tykkum hava arbeitt hart fyri at koma til hesi úrslit. Um tit hava gjørt tykkara besta, so kunnu tit verða errin av tykkum sjálvum. Tú kanst ikki gera meira enn títt besta. Prógvið sigur ikki nakað um, hvussu hart tit hava arbeitt fyri at koma har til, sum tit komu, men tit vita tað sjálv.

Eitt próvtal sigur onki um samstarv, vinabond, kærleika og felagsskap. Hetta eru viðurskiftir, sum ikki eru so løtt at telja og máta. Pengar eru lættir at telja, teir eru góðir at hava, men í sær sjálvum gera teir teg ikki lukkuligan. Eitt høgt próvtal er eisini gott at hava, men í sjálvum sær ger tað teg ikki lukkuligan. Tann sum einans leggur dent á tað, sum kann mátast, verður fátækur. Lívið er annað og meira enn tað, sum kann mátast.

Fyri meg er tað heilt serligt at standa her í dag. Tað eru 7 mánaðir síðan eg fekk tann heiður at avloysa Honnu sum rekara, ímeðan hon er í Tinginum. Eg má siga, at hetta hevur verið ein sera spennandi uppgáva. At sleppa at standa á odda fyri at skapa karmar hjá tykkum næmingum at mennast í. Og so at síggja tykkum í dag. Floygdar pisur, klárar at flúgva víðari til næstu avbjóðing í lívinum.

Tit eru fantastisk. Á fleiri økjum eru tit nógv betri, enn eg og foreldur tykkara vóru fyri 30 árum síðani.

Møguliga er tað tí, vit tora at syngja við  Martin Joensen:

"*Ábyrgdin á tínum herðum;*
*gáva frá okkum til tín,*
*byrða, ið tung er at bera,*
*ber hana betur enn vit.*"

Tit verða bumbarderað við hóttanum um veðurlagskreppu, kríggj og annað ónt. Slíkar hóttanir skulu takast í álvara, men tit skulu eisini minnast, at heimurin í dag er munandi betri stað, enn hann var fyri nøkrum fáum árum síðani. Spyrji ommur og abbar um, hvussu tað var at liva fyrr í tíðini.

"Tað er gott at vita, heldur enn at gita". Mest sjónliga endamálið við skúlanum er at søkja vitan. Í skúlanum hava tit lært vísindalig háttaløg (metodur), sum hoyra til ymisku lærugreinarnar.  Svenski læknin og hagfrøðingurin Hans Rosling er m.a. er kendur fyri eina samrøðu við danskan journalist um fátækdóm og barnadeyða, har hann sigur: "*Jag har rätt och du har fel*". Hann sigur at vit skulu vera kritisk, tá vit lurta eftir tíðindum. Ring tíðindi selja betri enn góð tíðindir. So einfalt er tað. Við hagfrøði staðfestir Rosling, at heimurin í dag er munandi betri stað at vera, enn hann var fyrr í tíðini.

Tað er okkara ábyrgd at taka dagsins hóttanir í álvara, at broyta tað, sum vit eru før fyri at broyta og – ikki minst – at lata tað liggja, sum vit ikki fáa gjørt nakað við. Samstundis er tað eisini umráðandi at síggja tað góða og dyrka teir jaligu møguleikar, sum vit eisini hava.

Góðu pisur

Minnist til at flenna og njóta lívsins ferð. Latið gleði verða ein grundleggjandi partur av tykkara gerandisdegi. Tað ger eisini lívið nógv stuttligari!

Einstein skal hava sagt, at tann sum ikki hevur gjørt nakran feil, hevur onki lært. Hóast feilir hava fylgur, so vóni eg, at tit hava dirvi at gera tað, sum tit halda er rætt - við vanda fyri, at tit dumma tykkum við hvørt. Eg haldi, at tann, sum ongantíð hevur traðkað við síðuna av, hevur møguliga gjørt ov lítið.

Hesar dagar fáa tit ofta spurningin "hvat fert tú at gera nú?" Nøkur hava svar og onnur vita ikki enn. Eg haldi, at tað ger, onki um ætlanirnar ikki eru lidnar enn. Um nøkur ár fara tit møguliga at siga tað sama, sum John Lennon sang: "Lívið er tað, sum hendi, ímeðan vit vóru upptikin av at leggja aðrar ætlanir."

Góðu pisur

At enda vil eg ynskja tykkum allar bestu eydnu í framtíð tykkara. Roynið flogið!
Takk fyri tíðina her á dalinum og hjartaliga til lukku við próvnum!
Jesus fylgi tykkum!

Christian Joensen, rektari.